# Einmansherurin

Hann tekur tað fegin á seg at vera klovnurin, sum prikar hol á tað uppblásta, so tað verður pláss fyri okkum øllum aftur. Sjálvur heldur Óli P., at vit neyvan hava havt meir brúk fyri satiriska broddinum enn beint nú. Og enn hevur hann ongar ætlanir um at gevast at hvessa sær blýantin



**ÓLI P. 70 ÁR**

*Anna V Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

- Fyri ein blaðteknara er Føroyar eitt vælsignað land at búgva í. Her hendir alla tíðina okkurt, tú ikki kanst annað enn at undra teg stórliga yvir. Í so máta eri eg sera heppin, tí evnini at undrast tykjast tíbetur ikki at hava nakað við aldurin at gera, sigur skemtarin, viðmerkjarin og blaðteknarin, Óli P., nú hann skjótt rundar tey sjeyti.

Nei, aldurin tykist ikki at tyngja Óla stórvegis, og spurdur, hvussu tað kennist at koma so langt upp í árini, sær Óli eitt syndur spyrjandi út

- Satt at siga veit eg ikki. Eg burdi vist verið tigandi, álvarsamur og vísur nú, men eg eri alt ov barnsligur. So tað tú sært, er bara snýt, eitt gamalt hylki við einum smádrongi innaní.

### Tíðin rópar á satiru

"Ein einmansherur", hevur fyrrverandi bankastjórin, Jørn Astrup Hansen, kallað Óla P., í tí hann sipaði til tekningarnar, sum eftir hansara tykki listarliga eru í serflokki. Dygdirnar heldur Óli, at onnur betri kunnu meta um, men hatta við einmansherinum kennir hann seg aftur í

- Sum blaðteknara kennir tú teg rættiliga einsamallan í Føroyum. Í grundini undrar tað meg, at vit eru so fáir, tí fyri mær tykist tað sum, at tíðin rópar eftir satiru. Vit síggja eisini, hvussu væl umtóktir Pipar og Salt eru. Teir duga nettupp hatta at punktera tað uppblásta á ein sofistikeraðan máta, sum jú er tað, sum eyðkennir góða satiru.

Við tað uppblásta meinar Óli ikki bara politikarar, sum taka seg sjálvar í so hátíðarliga. Serliga hesi seinnu árini hevur Óli undrast yvir, at alt er vorðið so "mega feitt" ella "kanón gott". Eitt er, at tað ikki kann passa, at vit eru so framúr góð. Tað er eisini tíð uppá at vera á varðhaldi, tá øll knappliga eru vorðin so sára samd, tí tað merkir sum oftast, at vit hava mist nuansurnar úr eygsjón

- So øvut tað ljóðar, er ein tann týdningarmesta uppgávan hjá einføldu blaðtekningini at fáa nuansurnar inn aftur í kjakið, uttan at fólk skulu verða noydd at draga seg ígjøgnum langar kronikkir hvørja ferð.

Ikki tí, drúgvar kronikkir skulu sjálvandi eisini til, slær Óli fast. Men tað týdningarmikla samfelagskjakið uppstendur líka ofta í egningarskúrinum, í kantinuni, umborð á ferjuni ella hvar fólk nú einaferð hittast.

### Fegni klovnurin

Sum tey flestu ivaleyst hava varnast, er tað júst, har fólk hittast í gerandisdegnum, at tað ikki so sjáldan er dagsins tekning hjá Óla P., sum fær ferð á kjakið.

- Tað gleðir meg at hoyra, tí so er mítt endamál rokkið. Mín tekning hevur onki lív, fyrr enn hon fær eina reaktión. Tað er hetta serliga samspælið millum hendingina, sum tekningin sipar til og tann, sum sær hana, sum gevur blaðtekningini sín leiklut. Øll duga og hava tíð at kveita at eini tekning. Og tey flestu fylgja so mikið við, at tey vita, hvat hon snýr seg um. Men tað allar týdningarmesta er nokk, at humorin í henni gevur pláss fyri, at øll kunnu sleppa framat við eini viðmerking til tað, tekningin sipar til.

Óli minnir á, at vilt tú drepa alt kjak, skal tú bara fáa sannført fólk um, at tey ikki hava skil fyri at siga sína hugsan um eitthvørt. Og hetta heldur hann er eydnast í so væl í nógvum førum. Úrslitið er, at fólk í ólukkumát ganga við eini undirlutakenslu, sum ger, at tey ikki tora at finnast at tíansheldur blanda seg uppí nakað sum helst

- Við mínum tekningum taki eg tað heldur enn fegin á meg at verða klovnurin, sum prikar hol á arrogansuna, so tað verður pláss fyri okkum øllum aftur. Eg kenni tað frá mær sjálvum við tí, sum er hent við tí føroyska málinum. Har føli eg tað, sum at onkur tók málið frá mær, og tá eg fekk tað aftur, høvdu orðini broytt týdning. Tað eru so nógv dømi efturhondini. Eitt nú fái eg knappliga at vita, at tað, sum fyrr æt "positivur" nú eitur "jaligur". Javell, so siga vit tað. Men tað má so merkja, at onkur nú kann vera "HIV-jaligur", gangi eg út frá.

- Nú ljóði eg sikkurt sum eitt gamalt grenj. Men gott er, tá man skjótt fyllir 70, má man sleppa at grenja eitt sindur.

### Tekningin, ið manglar

Nú heilar hálvtriðjatúsund tekningar hjá Óla P. eru givnar út í bók, er tað freistandi at spyrja, um nakað evni er eftir, Óli P. ikki hevur havt blýantin í – okkurt hann kanska ikki rættiliga hevur hættað sær í holt við.

- Tú meinar evni, eg havi malið um, sum ketta um heitan greyt? Jú, meir enn so. Men tað kemst ikki so nógv av, at evnið í sær sjálvum er ov trupult. Í prinsippinum kant tú tekna alt. Tað, sum er umráðandi, er at finna ein hóskandi vinkul, so tekningin kann verða eitt íkast, sum hevur okkurt meir uppá hjarta. Annars er ongin orsøk at tekna hana.

- Skal eg nevna eitt dømi, má tað verða søgan um "Lítla Petur". Tann støðan er ómetaliga ólukkulig, og tað eru ikki míni ørindi at gera viðmerkingar til hana. Men mátin, hon hevur verið førd fram í fjølmiðlunum hevur leingið órógvað meg,